Hotel Lonin á Eiði:

# Fáa hotellið á landkortið



*John Kruse hevur saman við systkjum og foreldrum keypt Hotel Eiði, sum nú eitur Hotel Lonin*

**Fyri stuttum skifti Hotel Eiði eigara og navn. Nú eitur tað Hotel Lonin, og eru ætlanirnar hjá nýggju eigarunum nógvar. – Vit vilja hava hotellið á landkortið, og vit eru optimistisk nú vit fara undir hesa verkætlanina, sigur Frank Nielsen, sum er ein av nýggju hotel-eigarunum**

HOTEL
*Ingrid Bjarnastein*

**Eiði:** Tað luktar av frískum blómum í gongini á Hotel Lonini á Eiði. Og tað er kanska heldur ikki so undarligt, tí sum ein kemur inn, so standa blómutyssi og samanplantingar í hópatali á einum borði.

Hotel Eiði, sum nú eitur Hotel Lonin, skifti fyri stuttum eigara og navn. Leygardagin var móttøka á hotellinum, har knapt 200 fólk stukku inn á gólvið at heilsa uppá nýggju eigararnar. Og teir hava veruliga sett spitarin í botn, nú háárstíðin so smátt er byrjað.

– Vit vóru í holt við at klæða eini hús, tá fyrrverandi eigarin kom framvið og segði, at nú var hann til reiðar at selja hotellið, sigur Frank Nielsen, sum saman við systrini Lis Nielsen, bróðrinum John Nielsen og báðum foreldrunum Hans Jørgen og Jóhonnu Nielsen, eiga og reka hotellið.

– Tað eru eini átta ár síðani vit fyrstu ferð spurdu hann um hann var sinnaður til at selja hotellið, og síðani tá hava vit við jøvnum millumbilum spurt, men tað hevur sum oftast verið í spølni.

Á páskum var so farið í gongd við yvirtøkuna av hotellinum, og síðani tá hevur tað gingið skjótt frameftir.

Hans Jørgen og Jóhanna hava havt Lonina í Elduvík í fleiri ár, men ein lítil matstova og eitt hotell er ikki júst tað sama. Hvørki í vavi ella í rakstri.

– Vit hava havt gestir síðani vit lótu upp. Vit byrjaðu við einum fótbóltsbraki tá dysturin millum Føroyar og Týskland var, og tá høvdu vit 84 fólk sitandi til borðs í matstovuni, greiðir Frank frá.

### Á landkortið

Ætlanin hjá nýggju eigarunum er at fáa hotellið á landkortið.

– Vit vilja geva fólki eitt gott upplivilsi, so tey koma aftur til okkara. Ætlanin er eisini at fáa tey lokalu við, tí tað ber ikki til at liva av ferðafólki í Føroyum. Her skal altíð verða opið, tí tað er keðiligt hjá fólki at koyra til einkis, men beint nú, taka vit tað bara sum tað kemur, sigur nýggi hotelleigarin.

Nógvar ætlanir liggja eisini frammi á borðinum. Okkurt skal gerast í stand, men beint nú verður denturin lagdur á, at hava tað reint og pent. So kunnu umvælingarnar fara í gongd, tá háárstíðin er av.

– Vit hava nógv hugskot, men um øll kunnu gjøgnumførast vita vit ikki. Hetta er ein stór avbjóðing fyri okkum, og eg havi ongar royndir innan hotellvinnuna uttan tað, at eg havi verið gestur á nógvum hotellum, sigur Frank og stórflennir. Hann leggur síðani afturat, at hann hevur arbeitt sum náttarvakt á einum hotelli í tríggjar mánaðir, men annars eru royndirnar ongar.

– Hetta er ein gamal dreymur, og tú lærir allatíðina. Vit eru optimistisk, og vænta, at hetta fer at ganga. Vit hava lagt eina fíggjarætlan fyri árið, og okkara einasta mál í løtuni er at fáa hana at bera seg.

Annars kann til stuttleikar nevnast, at í røðuni, sum Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði helt til móttøkuna leygardagin, nevndi hann, at tann dagin, 14. juni, fyri júst 20 árum síðani helt hann røðu, tí tá lat hotellið á fyrsta sinni upp.



*Hotel Lonin skal nú á landkortið, siga nýggju eigararnir*

# Gongutúrur niðan á Malinsfjall

GONGUTÚRUR
*Ingrid Bjarnastein*

Eysturoyar Kunningarstova skipar sunnudagin 22. juni fyri gongutúri niðan á Malinsfjall á Viðoynni.

Farið verður av Leirvík klokkan 11 um morgunin, og frá Klaksvík verður bussur til Viðareiði.

Frásøgumaður á túrinum verður Eljón Simonsen. Túrurin er miðaltungur at ganga.

Til ber at melda seg til á Kunningarstovunum í Eysturoynni á telefon 449 449, 444 860 og 211 449.

# Gestir og Makrel í Gøtu

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið 20. juni verður rock-konsert í Losjuni í Gøtu.

Við verða teir báðir Prix Føroyar finalubólkarnir Gestir og Makrel.

Gestir, sum kunnugt vunnu Prix Føroyar kappingina, skulu seinast í juni mánaði niður til Danmarkar at spæla á Nibe festivalinum í Jútlandi. Og í hesum sambandi hava teir gjørt rættiliga fitt av nýggjum tilfari.

Á konsertini í Gøtu verður høvi hjá áhugaðum at fáa ein lítlan forsmakk av hesum.

Herfyri gav bólkurin Makrel, sum gjørdist nummar trý til Prix Føroyar í ár, fløguna »Makrel Stinkar« út.

Báðir bólkarnir eru annars eisini við á nýggju fløguni »Prix Krem«, sum júst er komin út.

Dyrnar lata upp klokkan 22, og kostnaðurin er 80 krónur.



*Gestir og Makrel skulu fríggjakvøldið spæla til konsert í Losjuni í Gøtu*

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



# Friður kann ikki keypast

**Áttanda árið á rað er italiumaðurin, Andrea Rossi, í Føroyum. Honum dámar so væl her, at høvdu umstøðurnar loyvt tí, so hevði hann flutt til Føroya. – Føroyingar eru meira framkomnir og siviliseraðir enn onnur fólk. Her ber til at fara út uttan at læsa eftir sær, og tað er takk til fólkið, at hetta letur seg gera. Tí frið kanst tú ikki keypa fyri pengar, sigur Andrea Rossi, sum er lækni úr Genova í Italia**



*Myndatxt: Andrea Rossi úr Genova í Italia er áttanda árið á rað í Føroyum. Honum dámar væl, og ivast ikki í, at hann fer at halda fram við at koma*

SUMMARGESTUR
*Ingrid Bjarnastein*

**Eiði:** Nógvir serligir summargestir vitja oyggjarnar nú háárstíðin so smátt er byrjað. Og ein av teimum er Andrea Rossi, sum er úr Genova í Italia. Hetta er áttanda árið á rað, at Andrea er í Føroyum, og honum dámar so væl, at hann ætlar sær at halda fram við at koma til Føroya, so leingi hann kann.

– Eg havi verið her hvørt ár síðani 1996. Konan og eg ætlaðu at fara til Íslands í tríggjar vikur, men so broyttist ymiskt, og vit kundu bara vera burtur í eina viku. Tá hildu vit, at Ísland var ov stórt, so vit komu her, sigur Andrea, sum minnist, at tað regnaði alla tíðina.

– Ja, vit vóru rættiliga óheppin við veðrinum, so vit sóu ógvuliga lítið. Men tað, vit sóu, dámdi okkum, so vit komu aftur árið eftir, og tað var tá, at vit forelskaðu okkum í landinum.

### Sæð næstan alt

Andrea hevur ferðast nógv í Føroyum tey átta árini hann hevur verið afturvendandi gestur. Men hvørt ár hevur hann búð í Lonini í Elduvík, og tað ger hann eisini í ár. Sjálvt um eigararnir hava fingið eitt stórt hotell á Eiði, so vil hann heldur búgva í Elduvík.

– Eg havi sæð næstan alt, sum er at síggja í Føroyum. Men trúgv tí ella ei, so havi eg ongantíð verið í Nólsoy enn, sigur hann og flennur. Andrea greiðir frá, at hvørja ferð hann skal fara, so er tað keðiligt veður, og um ein skal ganga út á Borðuna, so má veðrið helst vera hampuligt.

Kona Andrea hevur seinastu árini ikki verið við í Føroyum. Henni dámar ikki eins væl at ganga og hann.

– Eg eri ein náttúruelskari. Arbeiðið hjá mær er ógvuliga krevjandi, men tá eg komi til Føroya, so slappi eg av. Staðið, eg komi frá, og Føroyar hava onki til felags, og tað er tað, mær dámar so væl.

### Yndisstaðið

Sum sagt, so hevur Andrea sæð tey flestu støðini í Føroyum. Men tað eru støð, sum honum dámar betri enn onnur.

– Eg kann ikki lata vera við at nevna Mykines. Eisini vitin har norðanfyri Trøllanes. Tá tú situr har, hevur tú so gott útsýnið og tú ert einsamallur við tær sjálvum. Og so sjálvandi eisini tað, at tú ert á eini útoyggj. Allar tær lítlu bygdirnar dámar mær eisini væl. Gjógv og ein túr niðan í Ambadal. At taka bátin til Fugloyar er eisini sjarmerandi, sigur Andrea, sum sjálvandi eisini hevur verið á Slættaratindi. Og henda dagin, vit fáa orðið á hann, hevur hann verið við Fjallavatn. Um honum dámar støðini hann sær, so vendir hann aftur, tá høvið býðst.

Túrarnar ger Andrea sjálvur. Tá konan var við tey fyrstu árini vóru tey sjálvandi saman, men sigur Andrea, at honum dámar best at gera túrar einsamallur.

– Mær dámar best at fara har, sum eg kann sita og hugsa og gera eina ferð innan í mær sjálvum. Tað eru nógvir mátar at ferðast uppá, og hetta er mín. Nógv fara til eitt nýtt stað hvørt ár, og ferðast runt og síggja eitt nýtt pláss hvønn dag. Men tá alt kemur til alt, so hava tey onki sæð. Eg plagi at seta meg niður í eini tveir tímar, og síðani finna meg sjálvan, greiðir italiumaðurin frá.

– Tað er stuttligt at koma til Føroya. Eg havi fingið nógvar vinir her. Til dømis hitti eg tað eina árið eitt belgiskt par, og tey havi eg samband við enn.

Andrea sigur, at tað er gott fyri atmosferuna at koma til Føroya.

– Og maturin er framúr góður. Sjálvt um eg eri italienari, so dámar mær væl matin her. Matur er mentan, og eg havi sjálvandi roynt grind og lunda, og tað, sum hartil hoyrir. Men tá tað kemur til mat, so eru Føroyar staðið at vera.

### Kennir seg væl

– At koma upp her er at kenna seg væl. Onki annað. Tað er her eg vil verða, og punktum. Eg haldi ikki, at nakað skal broyast við Føroyum. Eg havi onki ímóti, at tað verður soleiðis altíð.

– Men við nøkur fólk sigi eg, at tey skulu ikki fara til Føroya. Fólk ferðast av ymsum orsøkum, og um tey hava brúk fyri roki og larmi, so er hetta ikki staðið at koma.

Andrea heldur, at føroyingar eru seg sjálvir.

– Fólk eru tey, tey eru. Tað er so ymiskt at ferðast her og aðrastaðni. Eg vildi sagt, at tað var meira persónligt, at vera í Føroyum. Eg vóni ikki, at hetta verður til eitt stórt ferðamannaland. Onki nýtist at broytast. Eg haldi, at tað riggar fínt soleiðis. Tað, at tær ikki nýtist at læsa bilin tá tú fert út ella, at tú ikki nýtist at hugsa um, at tú skalt læsa húsini, er gull vert. Føroyingar eru bara nógv meira framkomnir og siviliseraðir enn aðrastaðni úti í heiminum, og teir stóla uppá hvønn annan. Og tað er takk til fólkið, at tað er soleiðis, tí frið kanst tú ikki keypa fyri pengar.

### Løðast

Arbeiðið hjá Andrea er stressandi. Hann hevur nógv at gera, og aftaná eitt ár av arbeiði kennir hann seg útbrendan.

– Eg havi brúk fyri at koma til Føroya. Eg skal løðast upp aftaná eitt ár av arbeiði. Eg veit, at tað er friðarligt her, og kann savna orku saman. Her eru ikki so nógv fólk, og landið er fullkomið tá ein skal slappa av.

– Í hesum døgum er tað ringt at finna tíð, sum er til sín sjálvs. Tað er ringt at finna pláss, sum bara er til tín. Tá eg komi til Føroya, so hugsi eg um meg sjálvan, og finni útav, hvar eg standi. Tað er týdningarmikið fyri meg at koma her. Sum ein spegil, har eg veruliga fái tíð at hyggja at mær sjálvum. Men her skal sigast, at eg stuttleiki mær sjálvandi eisini.

Andrea greiðir frá, at um tú ein góðveðursdag í Italia hevur hug at fara ein túr í fjøllini, so er tað heilt vist, at tú ert ikki tann einasti, sum hevur fingið tað hugskotið. Tí tá er tað sum allur býurin hevur flutt seg út í fjøllini.

– Her kanst tú seta bilin frá tær, og ganga eitt petti og tú hevur frið. Allastaðni eg havi verið, havi eg havt tað gott. Fólk eru blíð, og tá tey geva tær okkurt, so er tað frá hjartanum. Tey lata hurðina upp fyri tær, og tá hon verður latin upp, so gera tey tað ordiligt.

Um umstøðurnar høvdu loyvt tí, so hevði Andrea kunnað hugsað sær at flutt til Føroya. Men soleiðis verður tað helst ikki. Hann sigur, at konan hevði ikki kunnað búð nakra aðrastaðni enn í Italia, og so høvdu arbeiðsumstøðurnar helst ikki loyvt tí heldur.

– Fólkatalið her er á støðd við ein lítlan bý í Italia. Eg havi vant meg við at arbeiða nógv, og hava nógv at gera. Og um eg hevði komið her, so hevði tað verið nógv minni til mín at gjørt. Men tað hevði sjálvandi verið gott. Arbeiðsrútman hevði verið minni streingjandi, og arbeiðshátturin hevði verið nógv øðrvísi. Men so løgið tað ljóðar, so meira tú arbeiðir, so er tað verri og verri at venja seg við at arbeiða minni.

Men Andrea dylir ikki fyri, at um hann hevði verið einsamallur, so hevði hann komið til Føroya.

– Kanska ikki altíð. Men í øllum førum í eitt ár. Eg vil fegin seta meg meira inn í samfelagið og koma at kenna meira fólk.

– Men eg eri ikki í iva um, at til Føroya fari eg halda áfram við at koma, so leingi sum eg kann, sigur Andrea Rossi, úr Italia at enda.